## Grønlandsbankin minni avlop

Grønlandsbankin hevði 42,7 milliónir krónur í avlopi fyrra hálvár, men tað var einar 20 milliónir krónur minni enn í sama tíðarskeiði í 2007, sigur grønlendska kringvarpið. Orsøkin er fyrst og fremst kurstap av virðisbrøvum. Harafturímóti vísir roknskapurin, at inntøkurnar hjá bankanum vóru 7,2 prosent størri enn fyrra hálvár í fjør. Leiðslan skrivar í frágreiðing til roknskapin, at grønlendski búskapurin hevur tað gott, og at útlitini eru góð fyri seinna hálvár.

## Grønlendingar skeiva viðferð

Danski vælferðarráðharrin Karen Jespersen vil hava at vita, hví tíggju grønlendskar familjur hava fingið boð um at flyta úr Gellerup Parkini í Århus. Í brævi til borgarstjóran í Århus kommunu, Nicolas Wammen, skrivar ráðharrin, at tær grønlendsku familjurnar fingu ikki frið fyri ungum muslimum í Gellerup Parkini, men at tað kortini vóru tær grønlendsku familjurnar, sum blivu fluttar. Sambært borgarstjóranum bóðu tær tíggju familjurnar um at fáa annað pláss at búgva í.

# Grundøki tøk hóast nógv er bygt

**Stórur áhugi er at búseta seg í vestastu kommununi. Seinastu árini eru 20 nýggj sethús bygd í nýggjastu útstykkingini í Sørvági**

BYGGING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Sørvágur:** Tað tók ikki langa tíð, frá fyrstu grundøkini vóru tøk, til fólk fóru undir at byggja í Hagagerði.

Kommunan hevði í eina tíð arbeitt við at gera sítt til, at tey ið høvdu hug at búseta seg í Sørvági, kundu fáa grundøki til tess.

Longu fyrst í januar mánaði í fjør vóru tvey hús komin upp at standa her, ovarlaga í bygdini, hóast hávetur var.

Í dag ber til at staðfesta, at øll grundøkini í hesum økinum eru seld, samstundis sum eini 12 onnur øki eru planerað og klár at selja.

Sambært borgarstjóranum, Jákup Suna Lauritsen hevur kommunan ikki nakrar umsóknir liggjandi um byggiloyvi.

- Hevur onkur áhuga í einum grundøki, er bara at seta seg í samband við okkum, sigur hann.

### Vaksandi fólkatal

Hyggur ein eftir fókatalinum í Sørvági, so hevur tað verið í støðugum vøkstri tey seinastu mongu árini.

Undir kreppuni fyrst í 90'unum og árini frameftir minkaði fólkatalið nakað, til tað var lægst í 2000 tá tað einans búðu 886 fólk í Sørvági.

Síðani tók talið at vaksa, og fór í februar mánaði í ár á fyrsta sinni síðani 1990 upp um 1000 íbúgvar.

Umframt nevndu útstykkingarnar í Sørvági, er útstykkjað fyri seks grundøkjum í Bø og sum øll eru seld, umframt eini sethús sum eru í gerð í Gásadali.

Seinastu hagtølini frá Hagstovuni vísa, at 1. juni í ár búði 1006 fólk í Sørvági. Í øllum teimum fýra bygdunum í kommununi – Sørvági, Bø, Gásadali og Mykinesi – búgva íalt 1.111 fólk.

Verða tey 12 tøku grundøkini seld í næstum, bendir alt á at íbúgvaratalið er at vaksa enn meiri í kommununi.



*Nógv grundøki eru seld í Sørvági, og fleiri eru til sølu*

# Fleiri næmingar fáa undirvísing í íverksetan

**Fyrr í ár legði Íverksetarahúsið í Klaksvík eina ætlan fyri Mentamálaráðið um íverksetan í fólkaskúlan. Hetta skal gerast undir heitinum »Samfelagið inn í skúlan, og næmingarnir út í heim«**

SKÚLI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** - Meðan vit bíða eftir, hvat skal henda við hesi ætlan, er Young Enterprise komið væl áleiðis við júst hesum sama í Danmark, verður sagt úr Íverksetarahúsinum í Klaksvík.

Her hava ikki færri enn 10.000 skúlanæmingar havt íverksetan sum lærugrein seinasta skúlaár.

Í hesi vikuni fara ikki færri enn 65.000 børn frá árganginum 2002 at seta hol á eina langa og tíðarkrevjandi skúlatilveru runt í Danmark. Hetta hendir, hóast tey bert eru seks-sjey ára gomul.

Nú fara fleiri teirra longu hetta skúlaárið at nema sær kunning á íverksetaraøkinum og innan rakstur av fyritøku.

Kanska fara føroysk skúlabørn at luttaka í hesum sama um nøkur ár!

### Skapar dynamikk

Støðan í Danmark er hon, at fleiri og fleiri skúlar sera byrjaðir at seta íverksetan á tímatalvuna.

Til hetta høvið hevur Young Enterprise ment eina útbúgvingartilgongd við frálærutilfari um íverksetan til øll floksstig í fólkaskúlanum.

Hetta fingu heili 10.000 næmingar høvið at royna í fjør, mótvegis 3.500 árið fyri. Samanlagt 173 fólkaskúlar eru limir í sjálvstøðuga grunninum, Young Enterprise, og væntandi fer hetta talið at økjast til hetta skúlaárið.

- Alsamt fleiri skúlar hava latið eyguni upp fyri týdninginum av at kunna næmingarnir um teir mongu íver ksetaramøguleikarnir, sum heimurin hevur at bjóða. Hetta verður móttikið serstakliga positivt, sigur Dansk Erhverv, har stjórakonsulenturin Søren Friis Larsen fegnast um tølini.

Hann vónar, at átakið fer at røkka út á enn fleiri skúlar í framtíðini. Sambært honum hevur íverksetan stóran týdning fyri danskt vinnulív.

- Tað gevur dynamikk og eina menning, sum eisini kann rippa upp í tí verandi vinnulívinum.

- Tað er tískil umráðandi at fáa íverksetan inn í skúlaskipanina, tí tað kann verða við til at skapa enn fleiri íverksetarar og ágrýtin arbeiðsfólk, sum støðugt kunnu víðarimenna fyritøkur, sum vit longu kenna í núverandi vinnulívinum, sigur Søren Friis Larsen.